# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Onnur bókin um Dáva í Tjørnuvík

**Frá kl. 16-18 mánadagin 13. november verður móttøka í "Glitnir" í Gr. Kambansgøtu í Havn í sambandi við at Forlagið Glint gevur út annað bind av lívssøgu Dáva í Tjørnuvík**

BÓKAÚTGÁVA

Í fjør kom bókin "Dávur í Tjørnuvík: Lívssøga 1911-1937" út á Forlagnum Glint, og nú kemur onnur bókin "Dávur í Tjørnuvík: Lívssøga 1937-1966" á sama forlagi.

Tað er Sveinur Ísheim Tummasson í Havn sum skrivar bøkurnar, sum eru um 95 ára gamla tjørnuvíkingin Dáva Davidsen og hansara lív á sjógvi og landi.

Í hesari seinnu bókini sigur Dávur m.a. frá brúðleypi sínum, ódnarveðrinum á Suðurlandinum 1938, útróðri á Bakkafirði, grønlandstúrinum við Sonnu 1940, útróðri í Tjørnuvík undir krígnum og seinastu ferðini, sum tjørnuvíkingar gjørdu í Stapan.

Hann sigur frá tíðini á Tórshavnar Skipasmiðju undir krígnum og arbeiðslívið í Reykjavík aftan á kríggið. Hann fer til Grønlands við Tinganesi trý summur, fer at sigla við týskum trolarum, og fær arbeiði á fiskavirki í Keflavík, har hann arbeiðir sum formaður í mong ár. Men í Tjørnuvík hevur hann heimstað, og hagar kemur hann altíð aftur.

Bókin fæst til keyps kring landið alt fyri 350 krónur.

Høvundurin sigur, at bókin verður seld í nógvum ymiskum handlum kring landið og ein flokkur av miðnámsnæmingum tekur sær eisini av søluni. Møguliga verður hon ikki at fáa í øllum bókahandlunum, tí forlagið metir at 33 prosent í vinningi er ov nógv at lata í umboðssølu fyri eina bók, sigur Sveinur Ísheim Tummasson.




*Dávur Davidsen við nýggju bókini "Dávur í Tjørnuvík: Lívssøga 1937-1966". Dávur er í dag 95 ára gamal*

*Mynd: Jens Kristian Vang*


## Sethús í Havn til sølu











Um hóskandi boð fæst, eru húsini við Vallalíð 13 til sølu. Talan er um stór sethús í friðarligum umhvørvi við góðum útsýni yvir Havnina.

Húsini standa á 564 fermetra stórum grundøki við blindveg. Og hoyra carport og úthús til. Túnið kring húsini er steinsett.

Húsini eru bygd í tveimum hæddum upp á tilsamans 240 fermetrar.

Í ovaru hæddini (uml. 160 ferm.) er durur, hjúnarrúm, baðirúm, stova v/bitapalli (hems), køkur, gestakamar og wc v/brúsu.

Í kjallarahæddini (uml. 80 ferm) er skrivstova/kamar, vaskirúm og stórt alrúm.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 223336 og frætta nærri um húsini.**

*Boð undir 3.200.000 hava ongan áhuga.*